# Bilar

Nr. 53 • hósdagur • 17. mars 2005 • 79. árg.

### BMW 320i

| | | | |
|---|---|---|---|
| Motorurin: | 2,0 litur 4 syl. bensin | Hædd: | 142,0 cm |
| 150 hk | | Eginvekt: | 1.350 kg |
| 0-100 km/t: | 9,0 sek | Viðførisrúm: | 460 litrar |
| Bensinnýtsla: | 13,5 km/l | Prísur: | Kr. 360.000,- |
| Dekkstødd: | 205/55-16 | Søluumboð | Sp/f Nordcar |
| Stødd og vekt | | | Smiðjugerði 4 |
| Longd: | 452,0 cm | | FO-100 Tórshavn |
| Breidd: | 182,0 cm | | Tel. 308080 |

BMW 3-serian:

# Mest týðandi bilurin hjá BMW

*Nýggi BMW 320i. Designið er smart og elegant og líkist 5-seriuni*




**BMW eru komnir á marknaðin við nýggju 3-seriuni, ið er ein bilur sum í mong ár hevur verið tann mest týðandi bilurin hjá BMW-verksmiðjuni. Bilurin líkist nú teimum størru BMW og verður framvegis drivin av bakhjólunum**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*




*Nýggi BMW-3 er nakrar sentimetrar longri og breiðari enn forgangarin. Bilurin verður framvegis drivin av bakhjólunum.*

3-serian hjá BMW hevur í mong ár verið tann mest týðandi bilurin hjá BMW-bilverksmiðjuni í München, og tann sum hevur givið mest avkast til fyritøkuna.

Tí er tað av stórum týdningi, at kundarnir taka væl ímóti bilinum, og at hann ikki er ov langt frá forgangaranum í útsjónd og stødd. Nýggja designið er smart og elegant og líkist 5-seriuni. Serian kom á marknaðin fyri 30 árum síðan, og er hesin sostatt 5. generatión.

Nýggi BMW-3 er nakrar sentimetrar longri og breiðari enn forgangarin og verður enn sum áður drivin av bakhjólunum.

Eins og á t.d. BMW-1 seriuni eru RFT-dekk (Run Flat Tyre), standard á øllum útgávunum. Dekkini eru gjørd til at kunna koyra eitt strekki upp á minst 80 kilometrar við 80km/t uttan luft

Eitt sum eyðkennir BMW 3-seriuna er at hann er sera væl ljóðdoyvdur. Startlykilin er avloystur av einum elektroniskum start/stopp knøtti, og servostýringin er hydraulisk. Saman við kompakta BMW kvalitetinum og góðu sportsligu koyrieginleikunum, er heildarmyndin av nýggju BMW 3-seriuni tað sum vit kundu vænta - ein gjøgnumførdur bilur í allar mátar.

Koyrieginleikarnir á forgangaranum vóru góðir, men hesin nýggi er munandi betri at koyra í allar mátar. Fyri at lætta um bilin eru partar av undirvognginum gjørdir úr aluminium. Motorurin er partvís gjørdur úr magnesium, ið er 30 prosent lættari enn aluminium. Tær ymisku útgávurnar fáast við 16" og 17" hjólum.

Í fyrstu atløgu fæst BMW-3 við hesum motorum: (320i) 2,0 litur 4syl. bensin við 150 hk, (325i) 2,5 litur 6 syl. bensin við 218 hk, (330i) 3,0 litur 6 syl. bensin við 258 hk, (320d) 2,0 litur 4 syl diesel við 163 hk.

3-serian er í fyrstu atløgu komin sum sedan, seinni koma Coupé og Touring, eins og fleiri ymiskir motorar.

Opið hús verður leygardagin 19. februar frá kl. 10-16, har høvið verður at royndarkoyra bilin. Í hesum sambandi hava vit fleiri góð tilboð upp á nýggjar og brúktar bilar, sigur Jens Petur Jensen, stjóri hjá Nordcar.



*BMW-3 innan. Startlykilin er avloystur einum elektroniskum start/stopp knøtti, og servostýringin er hydraulisk*

## Avensis "Qualität 2005"



Toyota Avensis hevur fingið heiðursteknið "Qualität 2005" frá størsta týska brúkarafelagsskapinum, bilklubbinum ADAC, fyri hægsta kvalitet á týska marknaðinum. Tríggir aðrir Toyota vóru millum fimm teir bestu, teir vóru Yaris, Corolla og RAV4

*Kelda: ToyotaNet*

## Størsti bilframleiðari



Sambært bretska vinnufelagsskapinum SMMT (Society of Motor Manufactures & Traders) var Nissan bilverksmiðjan í Sunderland størsti bilframleiðari í Onglandi í 2004. Verksmiðjan framleiðir Nissan Micra, Almera og Primera

*Kelda: Nissan Sverige AB*

## Yvir 1 mill. Fiesta



Ford hava longu framleitt yvir eina millión Fiesta, sum kom á marknaðin í november 2001. Síðan fyrsti Ford Fiesta kom á marknaðin í 1976, eru framleiddir 11 milliónir bilar

*Kelda: Motor Magasinet*